*Framhald av síðu 11*

## Undan síni tíð

Summir rithøvundar brúka framtíðarsøguna til at lýsa nútíðina við, greiður Hanus Kamban frá. Hann nevnir skaldsøguna "The war of the world" (1896), ið snýr seg um marsmenn, sum gera innrás á jørðini og brúka geiðslatól til at útrudda alt innan fyri ein ávísan ring.

Søgan er bæði livandi og óhugnalig og verður ein góð lýsing av imperialistiskum londum á okkara døgum. Høvundurin dregur sostatt ótrúlig fyribrigdi inn í skaldaheimin fyri at lýsa okkum sjálv.

- Vísindaskaldsøgan kann ofta verða undan síni tíð, men hon kann ikki ávirka sína tíð, tí tú sært ikki samanhangin og líkleikan, fyrr enn tað er hent, sigur Hanus Kamban.

## Út um mørk

Søgurnar í "Tað nýggja Atlantis" eru kendar fyri at vera spennandi, óhugnaligar og hugtakandi alt í senn. Vit kunnu nevna fyrstu stuttsøguna eftir Natanial Hawthore, ið kallast Móðurmerkið (1843).

Hon er um ein vísindamann, sum giftist vakrari gentu. Gentan hevur bara eitt lítið lýti: Eitt móðurmerki á kjálkanum. Maðurin festir seg meira og meira við móðurmerkið og vil hava tað burtur. Hann ávirkar konuna, sum eisini verður plágað av móðurmerkinum. Maðurin er førandi vísindamaður um ta tíðina, og heldur hann kann fáa tað burtur, men móðurmerkið er so djúpt, at tað er partur av hennara innastu veru. Pilkar hann við móðurmerkið, so pilkar hann eisini við tilveruna.

- Søgan er mynd um, hvat kann henda, tá vísindamaðurin ikki kennir sær afturhald. Hesin vísindamaðurin, sum fer út um etisk mørk, er eitt afturvendandi høvundaevni í vísindaskaldskapi og er eisini væl umboðað í savninum, sigur Hanus Kamban.

## Viðkomandi bókmentir

Dr. Jekyl and Mr. Hyde, ið Hanus Kamban sum smádrongur í Skúgvi gjørdist so hugtikin av, er eitt annað gott dømi um vísindaskaldskap. Hon snýr seg um ein vísindamann, sum nýtir evnafrøðiligar rannsóknir til at skilja sundur tað góða og tað ringa. Søgan er viðkomandi enn í dag, tí hon nertir við nakrar etiskar trupulleikar í tíðini, nú møguleikar eru fyri kloning.




- Vísindaskaldskapur er ein viðkomandi bókmentagrein, sum mangan hevur tikið týðandi evni fram, áðrenn tey koma til sjóndar. Hetta savnið hevur fleiri áhugaverdar og spennandi søgur, sum kunnu lesast av øllum, sigur Hanus Kamban.

*"Tað nýggja Atlantis" er 387 síður og kostar 200 krónur. Bókadeild Føroya Lærarafelags og Føroya Skúlabókagrunnur geva út, og Hestprent prentaði. Edvard Fuglø gjørdi kápumyndina.*

whazzzup!!!

Forrige Næste Svar Svar alle Videresend Flag Udskriv Rediger Slet Ombryd igen Udkast

### TELDUBRÆVIÐ

Frá: Árni Gregersen, Bornholm – argr@tv2bornholm.dk
Til: turid@sosialurin.fo
Evni: Vikuskifti

## Jólini nærkast í hvørjum.....

Yvirskriftin sigur, hvørja tíð á árinum vit hava nú. Heystið er farið afturum, veturin og myrkrið eru komin, og tað nærkast jólum.

Vit vita, at kristna høgtíðin og tíðin tá ið dagarnir aftur fara at leingjast, eru samstundis. Um hetta hevur nakað við hvørt annað at gera er óvist, men vist er, at tað passar okkum føroyingum ógvuliga væl.

Nú bert ein góð vika er eftir til jólaaftan vita vit, at sólin fer at venda, og at tað aftur fer at ganga móti ljósari tíðum. Bert vitanin um, at so er, ger at nógv av okkum gerast í betri hýri. Boðskapurin, sum jólini bera okkum, benda so sanniliga eisini rættan veg.

Tí gleða vit okkum til jóla. Eg veit væl, at nógv hava ovmikið at takast við júst hesa komandi vikuna, men skulu vit fáa nakað burturúr, so ræður um at nýta tíðina rætt og ikki øsa alt uppí skúm. Vit vita, at jólini geva okkum nakrar dagar, har stundir eru at vitja ætt og vinir og seta ferðina niður.

Var sjálvur fyrr í vikuni til konsert í Sankta Nikolaj kirkjuni Rønne. Har vóru bæði barnakór og kirkjukór, men tað sum dróg meg hagar, var ein amerikumaður, sum sang.

Nú siga vit ofta nógv um amerikumenn - gott og minni gott - men sjálvandi finnast mong dugnalig fólk „in Gods own country." Robert Bailey hevur í meira enn 20 ár sungið saman við størstu countrystjørunum og sangarum yvirhøvur, m.a. Willie Nelson, Garth Brooks og nú seinast Keith Richard úr Rolling Stone.

Maðurin hevur eina framúrskarandi rødd. Tað er ikki ósatt, tá ið eg sigi, at bæði tá ið hann sang „Silent Night" og „Go tell it on the Mountin" reistust hárini á ørmunum.

Hann dugur hetta amerikanska, sum vit ofta hava sæð í sjónvarpi, at fáa øll við, og so gevur hann seg fult - røddin rungar í hválvinum í kirkjuni.

Jú, eitt sovorðið kvøld hugsi eg eitt sindur djúpari um tilveruna - og leingist heim.

Gleði meg til, at vit á TV 2/Bornholm hava gjørt avtalu við hann. Vit skulu savna eitt stórt kór sum hann skal arbeiða við í tríggjar dagar, og so verður konsert í ítróttarhøllini í Aakirkeby.

Her á Bornholm hava vit verið saman til jólahald. Tøkk til Berg Jacobsen, sum aftur í ár komn higar at halda guðstænastu. Eini 50 fólk vóru saman seinasta sunnudag.

Umframt guðstænastuna fingu vit ein kaffimunn við føroyskum køkum afturvið, og so sendu tey flestu jólaheilsur.

Í ár ætlaði eg eisini at senda, men satt at siga hættaði eg mær ikki framat mikrofonini. Eg sett meg við telduna at skriva tað, eg ætlaði mær at siga, men longu tá fekk eg ein klump í hálsin og glansandi eygu - so eg slerdi av.

Eg havi heldur ongantíð sent fyrr. Havi altíð sagt, at vit tosa so oftani saman í telefon, at tað ikki er neyðugt, men eg má tó viðganga, at jólaheilsurnar hoyra jólunum og jólaminnunum til.

Eg minnist væl kvøldini, tá ið Útvarpið sendi heilsur. Eg kenni royk av kaku, tá ið eg hugsi um jólaheilsurnar - stákast bleiv til jólar júst hesar dagar og spennignurin var stórur í húsinum.

Her á Bornholm stendur hampuliga væl til. Vit verða løgd saman í eina kommunu 1. januar, so nógv fyrireikingararbeiði hevur verið gjørt í heyst og í vetur.

Stýrisskipanin er ikki nógv broytt - fimm kommunur og eitt amt eru nú ein regiónskommuna. 27 fólk eru vald í regiónsráðið, og tey sita nú við evsta politiska valdinum her á oynni.

Hvussu tað fer at roynast er ilt at vita, tí nógvar nýggjar mannagongdir skulu gerast. Um tær fara at virka í praksis, fer at vísa seg í komandi árinum.

Eg endi hetta teldubræv við at senda jólaheilsur til ætt, vinir og kenningar og ikki minst tykkum, sum av og á kveita í teldubrævið.

Gleðilig jól og gott nýár.

# ítróttur

Nr. 241 • leygardagur • 14. desember 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

# Oddurin kann takast




*Neistin noyðiast at vera ein av avgjørdu lyklaleikarunum fyriuttan, nú Áki Mørk er skurðviðgjørdur í fótliðinum*

**Tvær grannauppgerðir verða leiktar í Havn um vikuskiftið, og í Runavík skal VÍF royna at toga seg upp at strandingum**

MANSHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Fult umfar er hjá monnunum í hondbólti um vikuskiftið. Oddaliðið av vestara armi á Skálafirðinum heldur sum einasta lið frí, og hetta merkir so eisini, at onnur lið hava møguleika at vinna seg heilt nær, og enntá fram um strandingarnar.

Hetta seinasta er eisini tað, sum VÍF hevur í hyggju, tá teir fara til Runavíkar at spæla sín seinasta dyst í grundspælinum. Við einum sigri her kunnu vestmenningar at kalla eisini tryggja sær, at teir eru fremstir, tá farið verður undir endaspælið. Hóast strandingar við sigri í sínum seinasta dysti koma upp á 18 stig, og VÍF í mesta lagi kann fáa 17, so merkir hálveringin av stigunum við ársskiftið, at bæði oddaliðini hægst kunnu hava 9 stig. Og tá er tað so málmunurin, sum verður avgerandi.

Og vestmenningarnir eru favorittar at vinna dystin. Tjaldur gjørdi ein lítlan vørr herfyri við sigrum á bæði StÍF og Kyndli, men hóast hetta prógvar, at dugur er í liðnum, so er illa hugsandi, at teir skulu taka VÍF. Vestmenningarnir hava havt sínar trupulleikar við serstakliga StÍF, men hinvegin er sjáldan, at liðið tapir teir á pappírinum løttu dystirnar, og bara tann dygdin í sjálvum sær átti at verið nóg mikið til at tryggja sigurin.

## Skerdir neistamenn

Í Havn verða ikki minni enn tvær lokaluppgerðir á skránni hetta vikuskiftið, og hava hesir stóran týdning fyri, hvussu støðurnar eru í ávíkavist toppi og botni á stigatalvuni.

Fyri at taka ovara endan fyrst, so er talan longu upp á forhond mest sum um ein gysara, tá Kyndil og Neistin fara at takast fyri aðru ferð í ár. Fyrru uppgerðina vann Neistin, og megna teir at endurtaka hendan sigurin, eru teir ájavnir strandingum á øðrum plássi, meðan Kyndil so má lata sær lynda at byrja endaspælið í øllum førum tvey stig aftan fyri oddin.

Hinvegin er nógv, sum talar fyri, at tað hesaferð fer at eydnast hjá Kyndli. Liðið er eftir ein lítlan niðurtúr í november mánaði so smátt farið at sýna tað stórspæl, sum fólkið á liðnum átti at verið borgan fyri, og hartil noyðist Neistin at vera ein av týdningarmestu leikarunum fyriuttan komandi vikurnar. Einasti landsliðsleikarin á liðnum, Áki Mørk, varð í vikuni lagdur undir skurð, soleiðis at eymu fótliðirnir skulu fáa tað lættari í framtíðini, og hetta merkir í øllum førum, at hann ikki verður tøkur hesumegin jól. Ivaleyst ein smeitur fyri Neistan í seinastu dystunum í grundspælinum, og ivaleyst ein smeitur fyri Áka, sum soleiðis ikki er tøkur hjá landsliðnum í januar mánaði. Men hinvegin kann við hesum helst vera tøkur aftur, tá farið verður undir endaspælið.

Seinna lokaluppgerðin í høvuðsstaðnum verður í Hoyvík, har tey bæði heimaliðini, KÍF og H71 fara at takast. Tað er mest sum greitt undan dystinum, at hvussu víkir og vendur, so verða kollfirðingarnir helst á fimta plássinum, tá farið verður undir endaspælið, men tað hevur tó nógv at siga, hvussu nógv teir kunnu nærkast teimum fremru undan hesum, og tí fara teir helst at leggja nógv fyri í royndunum at fáa ein sigur.

Hoyvíkingar skulu hinvegin royna at fóta sær, eftir átta tap á rað, og avrikini í seinastuni hava eisini víst, tað kanska ikki skal so nógv afturat til, áðrenn vend kemur í. So tað verður ikki givið nakað fyri einki í Hoyvíkarhøllini leygardagin.

# ÍF og so hini

**Hesa ferð verður tað Fram, sum fær »gleðina av« at royna seg ímóti ÍF, meðan Mjølnir skal royna at reisa aftur, nú teir hitta Fleyr, sum als ikki hevur fortíðarinnar styrki**

MANSFLOGBÓLTUR
*Kunning frá FBF*

Øll liðini hava roynt, men enn hevur ongum eydnast at gjørt nakað við ÍF. Ikki so mikið sum eitt einasta sett er tapt, og tað vísir styrkina. Fram skal hetta leikumfarið royna seg.

Hjá ÍF er sterki kantsamsharin Rúni Weihe skaddur og verður helst ikki við fyrr enn í Mjølnirkappingini í fyrsta lagi. Tað hevur sjálvandi við sær, at slagstyrkin hjá ÍF ikki er heilt tann sama, men Rúni var heldur ikki við ímóti Mjølni seinasta leikumfar, og tann dystin smurdi ÍF Mjølnir av. Í styrki minna Mjølnir og Fram nógv um hvørt annað, men hvørki av liðunum hevur sama trygga og støðga spælið, sum ÍF hevur víst higartil. Tað er tí væntandi, at ÍF fer at megna at enda fyrru hálvu av landskappingini við fullum stigatali. Ikki einki bragd.

## Mjølnir skal reisa seg

Gullvónirnar hjá Mjølni fingu ógvusligt skot fyri bógvin seinasta leikumfar. ÍF trýsti so væl og virðiliga Mjølnir niður og norð. Tapið var eyðmýking av teimum stóru, og nú er hjá klaksvíkingum at vísa, at teir megna at reisa seg.

Dysturin ímóti Fleyr er eins og kvinnudysturin góði gamli klassikarin, men til at gera dystin spennandi er Fleyr alt ov nógv viknað. Mjølnir eigur als ongar trupulleikar at hava av Fleyr og fær tað neyvan heldur. Fleyr má brúka hetta kappingarárið til at spæla nýggjar leikarar til í meistaradeildini, og tí verða úrslitini har eftir. Tað tekur sína tíð at gera seg galdandi í bestu deildini, men framtíð er í ungu leikarunum.